INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Kommunusamskipan Føroya og
Føroya kommunufelag

1. februar 2011
Mál: 10/00017-6

Málsviðgerð: HiH

**Til kommunufeløgini at taka støðu til**

Kommunufeløgini vera biðin um, hvørt í sínum lagi, at viðgera spurningin um fólksliga tilgongd í sambandi við ætlaðu kommunalu umskipanina, soleiðis at niðurstøðurnar hjá feløgunum kunnu viðgerast á avtalaða fundinum 22. februar 2011.

Aðalmálið við kommunalu umskipanini er at fáa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Við at skapa størri kommunalar eindir, kunnu kommunurnar átaka sær størri uppgávur t.d. eldrarøktina.

Tað er í hesum sambandi at vit ynskja at kommunufeløgini viðgera spurningin, hvussu vit tryggja, at tilgongdin verður so fólkslig og fólkaræðislig sum gjørligt.

Støðið er, at tær kommunalu eindirnar vera 9:

| **Komandi Kommunur** | **Núverandi kommunur** |
|---|---|
| **Norðoyar** | Fugloyar, Viðareiðis, Hvannasunds, Klaksvíkar, Kunoyar og Húsa |
| **Eystur** | Fuglafjarðar og Eystur |
| **Skálafjørðurin** | Nes, Runavíkar og Sjóvar |
| **Sundalagið** | Eiðis og Sunda |
| **Vestur** | Vestmanna og Kvívíkar |
| **Vágar** | Vága og Sørvágs |
| **Suðurstreym** | Tórshavnar |
| **Sandoy** | Skopunar, Sands, Skálavíkar, Húsavíkar og Skúvoyar |
| **Suðuroy** | Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar |

Í hesum eindum kann vera skipað fyri kunnandi fundum, fyrst við avarðandi landsstýrisfólkum og kommunustýrislimum í hvørjum øki sær, har landsstýrisfólkini leggja fram og høvi verður at seta spurningar og viðgera ymiskar hugsanir og ivamál. Í øðrum lagi kunnu skipast borgarafundir eftir sama leisti úti í økjunum.

Feløgini verða eisini biðin um at viðgera spurningin um fólkaatkvøðu í einstøku kommununum, har veljararnir vera spurdir, um teir taka undir við, at kommuna teirra verður løgd saman við teimum kommunum í økinum, har eisini fleirtal av veljarunum taka undir við kommunusamanlegging.

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 306800 · faks 306885 · imr@imr.fo · www.imr.fo

Úrslitið av einari tílíkari fólkaatkvøðu, kann vera grundarlag fyri at leggja fyri tingið uppskot um kommunusamanlegging, ið ásetur, at tær kommunur har meiriluti fyri samanlegging er staðfestur, sum ikki hava lagt saman sjálvboðið 1. juni 2012, verða lagdar saman við lóg. Kommunur har meiriluti fyri samanlegging ikki er staðfestur, verða ikki lagdar saman, men hava tvungið samstarv við tær kommunur, sum eru í teirra oman fyri nevnda øki. Í einum tílíkum tvungnum samstarvi, er ætlanin at avgerðarrættur og fígging, sum verður ásett í lóg, verða tengd at fólkatalinum í einstøku samstarvandi kommununum.

Annika Olsen
Landsstýriskvinna

Hilmar Høgenni
deildarstjóri